

*Mia saman við børnum sínum frá seinni giftuni, fv.: Marjun Joensen, Tórður Mikkelsen og Katrin Mohr*
Mynd: Vilmund Jacobsen



*Útsýnið úr stovuvindeyganum hjá Miu yvir Gøtuvík*
Mynd: Vilmund Jacobsen

skal fáa frið. Hann er júst blivin pápi til ein drong. So, ring tú aftur eftir døgurða… "

Óli skrivar, at Ólavur átti fimm gentur, áðrenn hann fekk henda eina drongin.

- Soleiðis var Mia – og harvið bleiv tað, skrivar hann.

## Rópar úr stovuni

Meðan vit enn sita við køksborðið, hoyrist fyrstu ferð røddin á Miu út úr stovuni. Hon rópar á eitt av børnunum um eitthvørt.

Nú er tíðin komin at fara innar at heilsa upp á føðingardagsbarnið, sum fyllir 100 um fýra dagar!

Mia situr í einum stóli innast í hugnaligu stovuni við einum minni sofaborði frammanfyri sær. Hon ber seg ógvuliga væl til høga aldurin og tykist vera væl fyri. Ein vøkur gomul kona. Tykist ógvuliga avslappað, men fylgir væl við, hvat fyrigongur rundan um seg. Hon sær, at fremmant fólk er komið á gátt. Haldi tað vera synd at órógva hana, har hon situr í friði og náðum. Fari heilt innar, rætti hondina fram – og hon rættir mær sína. Meðan vit halda í hondina á hvørjum øðrum, sigi eg, at eg eri versonur systkinabarn hennara á Nesi, Astrid. Jú, Astrid kennur hon væl, tí hon er av Gadd, haðani Mia eisini er ættað.

Eg fortelji, at tá ið hon fylti 90, vóru bæði Astrid og dóttirin, Karhild, í føðingardegi hjá henni.

Mia hoyrir illa. Seti meg tí hinumegin sofaborðið at vita, um hon fer at fortelja mær okkurt – ella siga okkurt, sum kundi verið áhugavert at havt saman við hesi greinini.

Hini fólkini, sum eru í húsinum hesa løtu, fylgja við innar í stovuna – og nú er eisini Jan Mohr, sonur Katrin og ommusonur Miu, komin á gátt. Vit kennast, men eg visti ikki, at Mia var omma hansara.

Mia hevur ikki hug at gera nakað serligt burtur úr, at hon fyllir 100 – og at so nógv skal gerast burtur úr hesum degi.

Hon endurtekur nakrar ferðir, at tá ið hon fyllir 100, verður hon uppi hjá sínum harra og frelsara, sum hon tekur til.

Men tað eru bara fýra dagar, til tygum fylla 100?

- Ja, men tað veit eingin av – og fær nakar tað at vita, fari eg at krógva meg.

Mia hevur ikki hug at gera nógvan háva burtur úr, og hon líkasum vil ikki "fata", at týsdagin verður ein stórur dagur í Gøtu.

Tygum kunnu vænta, at løgmaður og onnur týðandi fólk koma at heilsa upp á tygum týsdagin, tá ið føðingardagurin verður?

- Oyjesus, tað hopi eg ikki. Kemur løgmaður, so steingi eg hurðina. Tað verður synd, um tey koma, tí eg havi einki at bjóða teimum. Tit kunnu bara siga, at eg eri sjúk…

Meðan vit sita, sigur Mia, at hon er fødd uppi á Gadd á Nesi, har húsini standa á einum kletti.

- Pápi mín sá meg ongantíð. Hann róði út á Bakkafjørðinum í Íslandi, har hann doyði.

## Minnist væl

Við tað, at Mia hoyrir illa, er ikki so lætt at samskifta við hana, men tey, sum kenna hana og eru um hana um dagarnar, kunnu saktans tosa við hana um tað dagliga.

- Hon minnist væl, sigur Andrass, ommusonurin, sum býr í Danmark. Eg havi ikki sæð ommu í sjey ár, og nú eg kom heim til føðingardagin, spurdi eg hana, um hon kendi meg. Hon hugdi upp á meg og svaraði: "Kenni eg ikki míni ommubørn, Andrass?"

Hóast høga aldurin, tóktist Mia vera væl fyri.

- Omma býr heima; hon hevur ongantíð verið á nøkrum heimi, og hon hevur ongantíð verið til umlætting. Hon svevur á loftinum og gongur upp á loftið fleiri ferðir um dagin, sigur Mirjam.

Meðan vit sita í stovuni saman við Miu, fellir prátið á Jóhonnu, mammu Miu, ið sum nevnt eisini gjørdist 100 ára gomul.

Tórður sigur, at Mia er nógv betur fyri, enn omman var, tá ið hon fylti 100.

- Omma var seingjarliggjandi, tá ið hon fylti, og hon var næstan blind. Mamma er nógv betur fyri, og hon er nógv byrgari, enn omma var. Jóhanna doyði ein mánaða eftir, at hon hevði fylt 100, sigur hann.

Humoristiski "sansurin" hjá Miu kom rættiliga til sjóndar hendan dagin, vit sótu og prátaðu. Yviri á sofuni gongur prátið um Jákup Andreas, seinna mannin hjá Miu. Tá ið prátið fór at snúgva seg um, hvørt hann var 50 ella 51, tá ið hann doyði, leggur Mia uppí, hóast hon ikki rættiliga hevur fingið við, hvat tosað verður um.

- Var eg 51, tá ið eg doyði, spyr hon og fer at flenna, so tað stendur eftir í!

- Nei, góða, tygum fylla 100 týsdagin – og tygum eru ikki deyð, sigur eitt av børnum.

Strævnir dagar eru fyri framman hjá Miu og familjuni, nú føðingardagurin stundar til, so vit vilja ikki órógva meira.

Vit reisast, taka í hondina á Miu, ynskja henni ein góðan føðingardag og lova at bera eina heilsu út á Nes. Hon takkar fyri vitjanina. Vit takka fyri høvi at hyggja inn á gólvið og fyri gott kaffi og góðar køkur.

Tá ið vit standa í túninum, hevur Mia reist seg úr stólinum og stendur í stovuvindeyganum og veittrar farvæl.

Vit ynskja Miu og familju hennara hjartaliga tillukku við stóra føðingardegnum í dag.



*Stákast verður í túninum, nú føðingardagurin nærkast. – Eg eigi bara ein son, plagdi Mia at siga um Tórð*
Mynd: Vilmund Jacobsen